# Mótaframsýning í SMS

Í sambandi við mótaframsýningina hjá SMS í kvøld sýnir Elisa Heinesen ein brot av nýggjastu kollektiónini, AVA, sum varð víst í Royal Alberthall 14. oktober 2007. Her eru myndir frá kollektiónini.



# n eitt valdømi

*Skipað fyri hava: Snorri Brend Áki Bertholdsen og Rigmor Dam*

## Vága Valdømi



### NEI, tí vit missa ávirkan

**Josefina Falkvard, krambakvinna úr Miðvági:**

- Eg eri ímóti einum valdømi, tí eg rokni við at flestu politikkararnir fara at verða havnarmenn. Ein avleiðing av hesum kann verða, at vit missa flogvøllin.
- Vit í Vágum stóðu sera væl saman, tá málið um undirsjóvartunnilin kom fram. Eg eri vís í, at um tað verður eitt valdømi og hetta uppskotið kom fram seinni, hevði tað verðið sera trupult at fingið tað ígjøgnum.

### NEI, tí alt verður stýrt úr Havn



**Eirik Joensen, arbeiðsmaður úr Miðvági:**

- Mær dámar einki hetta uppskotið um eitt valdømi, tí eg óttist fyri at alt fer at verða stýrt úr Havnini. Tað er longu nóg ringt sum er.
- Politikkarar úr øðrum økjum hava ikki so lætt við at seta seg inn í umstøðurnar hjá okkum í útjaðarinum – og tá er líkamikið um talan er um Vágar ella Norðoyggjar. Tí verður trupult hjá teimum at fáa nýggj hugskot og meiningar um, hvussu hesi økini skulu mennast í framtíðini.

### JA, tí útjaðarin verður røktur eins væl



**Marni av Kák, fyrrverandi sýslumaður úr Sørvági:**

- Hóast eg eri partamaður hjá Marius (Dam úr Sambandsflokkinum), eri eg rúkandi ósamdur við honum: Vit skulu hava eitt valdømi.
- Vit eru fá í tali í Føroyum og landið er lítið, og eg trúgvi at útjaðarin verður røktur eins væl við einum valdømi sum undir verandi skipan. Tað verður neyvan tann stóra broytingin, tí oyggin verður neyvan meiri forsømd enn hon er í dag.
- Vit kunnu heldur ikki brúka Grønland sum fordømi, tí her er talan um eitt annað land uppá mangar ymiskar mátar, fyrst og fremst í støðd.
- Hinvegin so mugu teir sum stilla upp, bjarga sær nakrar atkvøður úr útjaðarinum, fyri at verða vísur í at verða valdir aftur. Tí mugu teir snøgt sagt arbeiða líka væl fyri øll í øllum økjum!

## Sandoyar valdømi

### JA, í dag heldur enn í morgin



**Tórur Johannesen, avgreiðslumaður á Sandi**

- Tað er eingin ivi um hetta í mínari verð: Vit mugu fáa eitt valdømi so skjótt sum gjørligt – heldur í dag enn í morgin.
- Vit í Sandoynni hava fingið sera lítið burtur úr í hesum valskeiðinum, - ja, tað er nærmast skammiligt!

### NEI, tí vit fáa slettis einki



**Poul Klementsen, bóndi á Sandi**

- Eri eg ímóti uppskotinum, tí eg vænti ikki, at okkara sjónarmið í Sandoynni verða hoyrd á sama hátt sum áður.
- Hvør avleiðingin verður um uppskotið verður samtykt? Tja, vit fáa lítið til Sandoynna sum er. Men við einum valdømi fáa vit slettis einki.

## Suðurstreymoyar valdømi



**Palle Henriksen, verkfrøðingur í Havn**

Ja, eg haldi tað er skilagott við einum valdømi. Kommunurnar kunnu føra lokalpolitikk. Vit skulu hava landspolitikk í tingið. Men eg haldi eisini, at málið er skundað nakað nógv ígjøgnum.



**Eivin Dam, pensionistur í Havn**

Ja, eg haldi tað er fínar greiðir við einum valdømi. Og eg rokni við, at tað verður betri fyri allar Føroyar.



**Lovisa Glerfoss, verkfrøðingur í Havn**

Ja, tað er deiligt, um vit fáa eitt valdømi. Tað gevur eitt rættvísari býtið av atkvøðunum. Men eg rokni allíkavæl við, at fólk í øllum landinum fara at verða hoyrd. Tað er eisini gott, at øll sleppa at velja øll valevni.



**Torleivur Mikkelsen, skrivstovumaður í Havn**

Ja, eg gangi inn fyri einum valdømi, tí so fáa vit landspolitikk inn á ting. Kommunurnar kunnu so taka sær av lokalpolitikki.



**Tórur Jacobsen, sjómaður úr Havn**

Ja, tað er ein sjálvfylgja at vit skulu hava eitt valdømi. Føroyar eru so smáar, og eg ivist ikki í, at tá fara politikkararnir at umboða alt landið og ikki bert teirra egnu øki. Men eg rokni eisini við, at flestu umboðini verða úr miðstaðarøkinum.



**Anna Højgaard, skrivstovukvinna í Havn**

Ja, eg gangi inn fyri einum valdømi. Fyrst og fremst tí, at so kunnu allir veljarar velja millum øll valevnini.



**Kristianna Høgnesen, handilseigari í Havn**

Ja, eg haldi tað er fínt við einum valdømi. So fáa vit kanska landspolitikarar. Tað skuldi verið gjørt fyri langari tíð síðani.